FRÁFARINGARROYND FÓLKASKÚLANS

Mai 2007

Støddfrøði

GREIÐSLU-ROKNING

4. tímar

1 Handilsrokning



Sanna var inni hjá Guðrun og Guðrun og keypti sær:

eitt belti fyri	550 kr
tríggjar hálsketur	150 kr fyri hvørja
eitt turriklæði fyri	350 kr
eina húgvu fyri	350 kr

a Hvussu nógv kostaði hetta henni?

Sanna hevði fingið 1000 kr frá mammu sínari.

b Hvussu nógv skuldi hon sjálv gjalda?

c Hvussu nógv prosent skuldi Sanna sjálv gjalda av øllum kostnaðinum?

2 Troyggjur



Sanna hevði sera góðan hug á einari ávísari troyggju. Troyggjan kostaði 1500 kr í handlinum í Havn.

Hendan troyggjan kostaði 2200 kr í Danmark.

a Hvussu nógv kostaði hon meiri í Danmark enn í Føroyum?

b Hvussu nógv prosent kostaði hon meiri í Danmark enn í Føroyum?

Sanna bant sjálv eina líknandi troyggju fyri handilin, og hon brúkti 15 tímar at binda troyggjuna. Sanna fekk 900 kr (og tógvið) frá handlinum.

c Hvør var tímalønin hjá Sonnu at binda troyggjuna?

3 Gjaldoyra

Ein niðurdeilur, bundin í Føroyum, kostar 950 kr.

Í Japan kostar hann tríggjar ferðir so nógv.

Gjaldoyrakursur

USA (dollarar - USD)	573,7000
Japan (yen - JPY)	4,7266

a Hvussu nógvar yen kostar niðurdeilurin í Japan?

Niðanfyri er talva, sum sigur miðalársinntøkuna hjá kvinnum og monnum í Føroyum og í Japan. Inntøkurnar eru í dollarum (USD).

Miðalársinntøkan hjá kvinnum		**Miðalársinntøkan hjá monnum**	
	USD		USD
Føroyar	22 835	Føroyar	32 518
Japan	16 601	Japan	37 345

b Rokna miðalársinntøkuna hjá kvinnum í Føroyum og í Japan í okkara peningi.

c Hvussu nógv prosent er miðalársinntøkan hjá monnum lægri í Føroyum enn í Japan?

4 Forstykki



Sanna skuldi seyma sær ein kjóla. Hon teknaði fyrst forstykkið.

a Tekna hesi fýra punktini í eina krossskipan: A = (0,0); B = (4,1); C = (2,7); D = (0,8).

b Spegla ferhyrningin ABCD um y-ásin, soleiðis at A fer í A, D fer í D, B fer í B_1 og C fer í C_1.

c Hvussu nógvar puntar er víddin á sekshyrninginum (forstykkinum) B_1ABCDC_1.

5 Túrur á súkklu og til gongu

Sanna og tvær vinkonur hennara súkklaðu ein túr úr Runavík yvir á Strendur at vitja á Snælduni. Teinurin, tær súkklaðu, er 26 km. Tað tók teimum 1 tíma og 18 minuttir at súkkla teinin.

a Hvør var miðalferðin?

Tær súkklaðu so til Morskranes. Við miðalferðini 20 km/t tók tað teimum 15 minuttir at súkkla teinin.

b Hvussu langur er teinurin av Strondum til Morskranes?

Av Morskranesi til Selatraðar eru 4 km. Tær gingu hendan teinin.

c Hvussu langa tíð tók tað teimum at ganga hendan teinin, um miðalferðin hjá teimum var 6 km/t?

6 Stampur

Høgrumegin er tekning av stampi (dánaður sum strýtustubbi) at vaska ull í (innaru mátini eru: $r_m = 35$ cm, $r_s = 40$ cm og $h = 40$ cm).



a Hvussu nógvar litrar tekur stampurin?

Tómur vigar stampurin 42 kg.

b Hvussu nógv vigar hann við 120 litrum av vatni í?

Stampurin er málaður innan.

c Rokna víddina á málaða flatanum.

7 Geometri og algebra

a Loys líkningaheildina: $y = x + 4$ og $y = -\frac{1}{2}x + 1$



b Rokna longdina á síðuni **c**.

c Umstytt framsøgnina: $2(a - \frac{1}{2}) - 3(a - \frac{1}{3})$